Árni Skaale
Bárður á Lakjuni
Beinir Johannesen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jørgen Niclasen
Vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina
(Avmarka heimildir at áseta reglur um avmarkandi tiltøk)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 22. juni 2023, verður í § 1 sum stk. 2 sett:

"*Stk. 2.* Heimildin fevnir ikki um fiskiveiðuavtalur, atgongdina hjá russiskum fiskiskipum at koma í havn í Føroyum og tænastuveitingar til hesi ella útflutning av fiska- og matvørum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Endamálið við uppskotinum er at loyva øllum russiskum fiskiskipum at koma í havn í Føroyum og loyva føroyskum veitarum at veita teimum allar tær tænastur, sum fiskiskipini hava brúk fyri.

Hóast Føroyar hava gjørt fiskiveiðuavtalu við Russland fyri 2024, er rættast at staðfesta, at fiskiveiðuavtalur ikki eru umfataðar av avmarkandi tiltøkum í sambandi við atgerðir móti Ukraina, eins og útflutningur av fiska- og matvørum.

12. juli 2023 bleiv ein avmarkaður havnastongsil settur í verk. Russisk fiskiskip blivu avmarkaði í at koma til lands, og heldur ikki fingu tey møguleika at fáa tænastuveitingar, tó eru m.a. bunkringar undantiknar.

Tað hevur tó ikki ávirkað russisku fiskiskipini nakað, tí tænasturnar hava tey í staðin fingið úr okkara grannalondum. Eftirlitið við teirra fiskiskapi hevur eisini verið avmarkað, av tí at umskipan fer fram á opnum havi nú. Avmarkingarnar hava tí ikki ávirkað russarar, men heldur havt neiligar avleiðingar fyri føroyingar.

Russar eru vanir at umskipa á opnum havi, og tað tók drúgva tíð at fáa teir at góðtaka at koma í føroyska havn at umskipa og keypa tænastur. Tað er lættari at hava eftirlit, tá skipini koma í føroyska havn. Tað er tryggari at bunkra. Tað er stórur vandi fyri oljudálking, tá bunkrað verður á opnum havi. Hetta sóu vit eisini, áðrenn skipini komu í føroyska havn. Tað at skipini komu í føroyska havn, legði nógvar pengar eftir seg til føroyskar havnir og føroyskar veitarar, sum frammanundan eru vanir at veita tænastur til fiskiskip.

Tá føroyingar valdu, sum rætt var, at gera fiskiveiðuavtalu við Russland fyri 2024, eiga vit eisini at venda aftur til tað virksemi, sum vit høvdu, áðrenn vit settu avmarkandi tiltøk í verk móti russiskum fiskiskipum.

Tó varðveitir landsstýrismaðurin allar aðrar heimildir at seta avmarkandi tiltøk í verk mótvegis Russlandi, ið lógin heimilar honum.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri okkara tænastuvinnu, ið aftur fær møguleikan at veita tænastur. Av tí sama skapar tað virksemi, ið síðan fær jaligan virknað fyri landskassan.

Eftirlit verður í nógv størri mun gjørligt, tá skipini hava møguleikan at koma í havn at umskipa heldur enn at umskipa á opnum havi.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Greinin hevur til endamáls, at tey avmarkandi tiltøk, ið landsstýrismaðurin gjøgnum kunngerð kann seta í verk, ikki skulu fevna um fiskiveiðuavtalur, atgongd hjá russiskum fiskiskipum at koma í føroyska havn og tænastuveitingar til hesi ella útflutning av mat- og fiskavørum.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Á Løgtingi 7. Mars 2024

Beinir Johannesen Árni Skaale Jørgen Niclassen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur Bárður á Lakjuni